Skúlin á
Argjahamri

Góðu foreldur!

Sum tit áður eru kunnað um, er grunddeildin á okkara skúla partur av Betri Vinir verkætlanini. Aðrir skúlar luttaka eisini. Verkætlanin verður framd í samstarvi við Barnabata, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Undirvísingarstýrið og Nám.

Hetta merkir, at starvsfólki í teim yngstu flokkunum fara á skeið 27. januar, har tey fara at læra at brúka tilfar og skipa fyri ymiskum virksemi, sum hevur til endamál at skapa góða og trygga floksmentan fyri allar næmingar.

Í hesum sambandi fara vit at gera eina kanning av trivnaðinum hjá næmingunum í grunddeild, tað er forskúli, 1., 2. og 3. flokkur. Endamálið við kanningini er at fáa upplýsingar frá næmingunum um, hvussu teir trívast í skúlanum, bæði fakliga og sosialt, so at vit kunnu staðfesta verandi støðu og fylgja við gongdini. Somuleiðis kunnu vit brúka tað í okkara víðari arbeiði við Betri Vinum og síggja, hvussu verkætlanin eydnast og roynist.

Kanningin er ein spurnakanning við 20 spurningum um teirra skúladag, til dømis um hvussu tey trívast í skúlanum, og hvussu teimum dáma fríkorterini og tímarnar. Næmingarnir verða navnleysir og skulu tí ikki upplýsa navn ella flokk. Hetta fyri at tryggja, at ongin einstakur næmingur kann "kennast aftur". Starvsfólk í skúlanum verða inni í flokkinum, meðan spurningarnir verða lisnir fyri børnunum, so at børnini fara at kenna seg trygg og eru saman við góðum og kendum fólki.

Kanningin verður framd nú í vár. Vit fara at greiða næmingunum frá endamálinum við kanningini, hvussu hon fer at fara fram, umframt at hon er sjálvboðin. Vit vóna, at tit lata barn tykkara luttaka, soleiðis at vit fáa so góða mynd av samlaðu støðuni í grunddeild sum møguligt. Um tit ikki ynskja at barn tykkara skal luttaka í kanningini, kunnu tit geva mær boð um hetta í seinasta lagi 31.01.2024 antin við at senda teldupost ella sms. So skipa vit tað soleiðis, at tykkara barn sleppur at gera okkurt annað, tá kanningin fer fram.

Hava tit spurningar ella ivamál, eru tit vælkomin at venda tykkum til mín.

Blíðar heilsur

Marin Sigvaldsdóttir Bláberg

Skúlastjóri, Skúlin á Argjahamri

t-postur: marin.sigvaldsdottir@skulin.fo

tlf: 224240